# Avstralskur dreymabilur



*Dreymabilurin Holden Efijy Concept er ein framsýning av øllum tí nýggjasta, sum rørist innan nútímans bilaframleiðslu*

**Dreymabilurin Holden Efijy Concept er ein framsýning av øllum tí nýggjasta, sum rørist innan nútímans bilaframleiðslu. Bilurin er gjørdur av bilverksmiðjuni Holden í Avstralia við einum av teirra fyrstu modellum sum fyrimynd**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Til eina bilaframsýning í Tokyo gjørdu Holden í Avstralia konseptbilin »Holden Efijy Concept« við Holden FJ frá 1953 sum fyrimynd.

Efijy er ein coupé við tveimum hurðum, ið er 5,16 m langur og 2 m breiður - bygdur yvir ein Chevrolet Corvette plattform.

Motorurin er ein 6.0 litra V8 við 650hk og núningsmomenti upp á 775 Nm.

Bilurin hevur 20" hjól framman (225/35 ZR20) og 22 hjól aftan (285/30 ZR22). Bremsuskivurnar hava ein diametur upp á 38,1 cm.

Eins og nógvir av nýggju retrobilunum er hesin á tremur av nýggjari tøkni við t.d. luftfjaðraskipan, touchcontrol LCD-skýggja og LED-ljósum. Bilurin er eitt dreymaprojekt og ein framsýning av øllum tí nýggjasta, sum rørist innan nútímans bilaframleiðslu.



*Innan wer designið flott og í gamlan stíl*



*Designið er sermerkt og minnir um ein luksuscoupé frá 50-unum*



*Holden Efijy Concept er bygdur yvir ein Chevrolet Corvette plattform*



*Efijy Concept verður gjørdur klárur á verksmiðjuni*





*Holden FJ frá 1953, sum er fyrimyndin hjá conseptbilinum Holden Efijy*